# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Javnstillan – ikki spekulatión

Í uppskoti til løgtingslóg sigur Tjóðveldi seg vilja strika rættin hjá privatpersónum at draga rentuútreiðslur og tap av virðisbrøvum frá í uppgerðini av skattskyldugu inntøku sínari.

Í viðmerkingunum verður millum annað sagt, at hetta er ein roynd at broyta teir stóru skeivleikar og bygnaðartrupulleikar í fíggjar- og búskaparpolitikkinum, sum hava elvt til, at føroyski búskapurin stendur fyri ovurstórum avbjóðingum.

Málið vendir tó skeivt, tá sagt verður, at talan er um skeivleika í skattalógini. Tá uppskotið varð samtykt, varð hetta ein harðliga tiltrongd javnstillan av privatpersónum og partafeløgum. Ein javnstillan, har tað verður staðfest, at skalt tú skattast av ávísum inntøkum, so kunnu tilhoyrandi útreiðslur av hesum eisini dragast frá somu inntøkum. Tað er ein rættur, sum vinnurekandi feløg hava pr. automatikk, og tí var talan um skeivleika, tá privatir borgarar ikki høvdu somu møguleikar.

Tí er tað ikki rætt, tá ført verður fram, at hetta hevur eggjað borgarum at taka upp lán til íløgur. Hinvegin er tað rætt, at ein skeiv teknisk forðing og ójavnvág varð tikin burtur, tá uppskotið varð samtykt.

Og hóast tað verður nevnt spekulatiónsíløgur, so er tað neyvan so, at privatpersónar kunnu spekulera seg til skattafyrimun við at missa pening upp á íløgur í virðisbrøv. Við einum kapitalvinningssattaprosentið upp á 35 er roknistykkið heilt einfalt, at tú skalt missa 100 krónur fyri at spara 35 krónur í skatti.

**Sosialurin**

## Varandi orkukeldur - ein vegur úr búskaparkreppuni



**BJØRT SAMUELSEN**
løgtingskvinna

Boðskapurin úr Poznan, har veðurlagsráðstevna júst hevur verið, er greiður: Átøk og íløgur í varandi orku er ikki einans neyðugt fyri at minka um útlátið av $CO_2$ - tað er ein av fyritreytum fyri, at fáa búskaparhjólini aftur at mala.

"Víst er búskaparkreppan álvarsom. Men, tá talan er um veðurlagsbroytingarnar, stendur enn meira uppá spæl. Klimakreppan ávirkar okkara møguleikar fyri menning, og lívið hjá heimsins borgarum - nú og langt inn í framtíðina. Tí er alneyðugt at stjórnir kring allan heim hava hetta mál allar ovast á dagsskránni", segði ST-aðalskrivarin Ban Ki-moon tá hann setti politiska partin av veðurlagsráðstevnuni í Pólandi.

Og ráðharrarnir frá flestu av heimsins londum tykjast samdir í hesum boðskapi. Tað er ikki longur ein spurningur um hvørt menning av varandi orku og minking av $CO_2$-útláti skal standa á dagsskránni, men í hvønn mun londini megna at koma til eina felags semju og eina nýggja avtalu at avloysa Kyoto-avtaluna á COP15 ráðstevnuni, sum verður í Keypmannahavn í 2009.

Veðurlagsmálið kann einans loysast í felag, og tí er optimisman vaksin munandi eftir at Barack Obama vann forsetavalið í USA. Hann hevur nevniliga greitt meldað út, at USA fer at nýta milliardir av dollarum at menna varandi orkukeldur, og ein ávís vón er tí um, at USA eisini verður við í næstu heimsavtaluni um at skerja $CO_2$-útlátið.

**Føroysk átøk**

Mánadagin skipar Innlendismálaráðið við Anniku Olsen, landsstýriskvinnu, fyri ráðstevnu, har uppskot til virkisætlan fyri at minka útlátið av veðurlagsgassum verða løgd fram. Arbeiðið er niðurstøða frá einum arbeiðsbólki, sum CHE-samgongan setti í gongd, og er frágreiðingin eitt gott kjakgrundarlag undir teimum politisku átøkum, neyðug eru at seta í verk.

Føroyar eru í trongum skóm fíggjarliga við einum risa halli á fíggjarlógini fyri 2009. Men, hetta eigur at eggja okkum til, heldur enn at forða okkum í at gera varandi orku til eitt høvuðsátaksøki. Vit eiga beinanvegin at seta upphædd, ið munar - í støddini 100 mio kr - av til menning og implementering av varandi orkukeldum og orkusparingarátøkum. Hetta skal fevna um átøk fyri skipaflotan, framleiðslu á landi, almennar bygningar, privatu húsarhaldini v.m.. Málið er bæði at taka okkara part av ábyrgdini fyri at steðga veðurlagsbroytingunum, men ikki minst at gera okkum leys av bindingini til oljuna, sum ger okkara búskap sárbæran.

**Nýggj arbeiðspláss**

At seta pengar í menning av varandi orkukeldum og orkusparing skapar arbeiðspláss - og tað er fremsta politiska uppgávan, nú tað sansar at í búskapinum. Hetta er eisini ein orsøk til, at nógv av heimsins londum í løtuni seta stórseglini til at menna varnandi orkukeldur. Í týsklandi eru higartil 250 000 nýggj arbeiðspláss skapt innan hetta øki og sjálvt Póland, sum í stóran mun framvegis nýtir dálkandi kol, hevur minkað sítt $CO_2$-útlát munandi við at satsa uppá varandi orku. ES er komið ásamt um 20% niðurskurð fram til 2020 í mun til 1990, India vil vera við, Stórabretland hevur sett málið til 26%, Norra vil skerja við 30% sviar kjakast um 35%, og í USA fer sum nevnt eitt siðaskifti fram á hesum øki. Saman við skandinavisku londunum eiga vit sjálvandi at vera við í oddinum, og við okkara støðugt vaksandi $CO_2$-útláti, hava vit eina víðfevnda avbjóðing at venda gongdini.

Fíggjarkreppan má ikki nýtast sum ein umbering fyri at taka tungu tøkini á umhvørvisøkinum, tykjast alsamt fleiri lond at vera samd um. Tað snýr seg um at satsa uppá varandi orkukeldur sum ein sentralan part av loysnini uppá búskaparkreppuna. Ella sum svenski umhvørvismálaráðharrin, Andreas Carlgreen, segði í Poznan: "To act on climate change, is to make development possible."

Avbjóðingin vit standa í krevur vilja og dirvi til at seta heilt nýggja orkukós fyri Føroyar.

*Poznan 12. des 2008*

## Uppískoyti til Matummælini í seinasta Gramsi

Hósdagin 11. desember ummælti eg ymiskar matvørur til jóla. Havi hug at greiða gjølligari frá hesum ummælum eftirsum at fleiri misskiljingar hava verið. Dunnur, reyttkál og kirsubersós, sum eru at finna á føroysku handilshillarnar fingu umrøðu. Tað er vert at geva gætur, at fleiri av hesum vørum eru at fáa í flestu føroysku handlum. Eitt nú er tað ikki bara Miklagarður í Havn, sum selir ta ensku Cherry Valley dunnuna. Havi viðhvørt nevnt hetta, at tað er vøran, ið lesarin skal hugsa um og ikki altíð matvøruhandilin, netupp tí at fleiri selja somu vøru. Tó ikki altíð til sama prís. Samkeyp-handlarnir kring landið selja eisini hesa frálíku dunnu frá Cherry Valley. Tó er tað eisini soleiðis, at ikki allir matvøruhandlar í Samkeyp-samstarvinum selja ta minni góðu Dansk And, ið eisini varð umrødd seinasta hósdag. Nevnda dunna varð keypt hjá PE í Havn.

**Mortan í Hamrabyrgi**




**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo
Bergur Johannesen bergur@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.